planet.fo
Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

planet.fo

# The Dreams við nýggjari útgávu



Nýggj fløga og live-dvd við The Dreams kom á marknaðin í Danmark og í Føroyum í gjár. Á útgávuni ber til at uppliva føroyska rockbólkin á konsert.

The Dreams skúma fram á danska tónleikamarknaðinum, og í gjár kom nýggj útgáva við bólkinum út bæði í Danmark og í Føroyum.

Den Nye By 09 - Sakin Live ´09 kallast útgávan, sum bæði er fløga og dvd. Á fløguni eru teir væl umtóktu sangirnir við The Dreams og onkrar live-upptøkur eru eisini við. Eisini eru 3 nýggir sangir á útgávuni.

Harafturat er eisini ein dvd-fløga við í keypinum, og á henni ber til at síggja og hoyra The Dreams spæla til sínar lívligu konsertir. Á dvd-fløguni eru eisini samrøður við tónleikararnir í The Dreams.

Í samband við útgávuna hevur The Dreams nógvar framførslur fyri framman, og sær skráin fyri mars soleiðis út.

05.03.09 – Keypmannahavn, The Rock
05.03.09 – Kb, Fona Frederiksberg sentrið kl. 16.00
06.03.09 – Birkerød, Mantziusgarðurin
07.03.09 – Sønderborg, Sønderborghúsið
13.03.09 – Greve, Greve ungdóms hús

Les meira á heimasíðuni hjá The Dreams www.thedreams.dk

## Eivør sendir heilsan til fjepparar



Á heimasíðu sínari, sendir Eivør eina heilsan til sínar fjepparar, har hon millum annað sigur, at hon følir, sum hevur hon verið burtur ov leingi. Orsøkin til hetta er, at hon er upptikin við at skriva nýggj løg, umframt at mála. Eivør sigur, at ljósið í Føroyum inspirerar hana, og at vit eru heppin, at sólin er komin aftur til klettarnar.

Eivør hevur ætlanir um at fara á rundferð í apríl, og gongur leiðin fyrst til Íslands. Hon sigur, at hóast kreppa hevur rakt íslendingar, so hava tey framvegis heimsins vakrasta land, og tað kann eingin taka frá teimum.

Fyrstu fýra framførslurnar í rundferðini hjá Eivør verða í Íslandi, og sær skráin soleiðis út:

03.04.09 – Nasa, Reykjavík
04.04.09 – Græni Hatturin, Akureyri
05.04.09 – Skagastrønd, Skagastrønd
09.04.09 – Vestmannaeyjar, Vestmannaeyjar

Rundferðin fevnir ikki bert um Ísland. Eivør skal eftir ætlan eisini framføra í Danmark, Grønlandi, Noregi, Kanada og Póllandi.

## Dóttirin vildi hava Lindu at syngja

Tað var nýggju ára gamla dóttirin, Celeste, ið fekk mammu sína at melda seg til X-Factor.

Tær báðar høvdu áður fylt við X-Factor kappingini, har Martin, Laura, Heidi og Basim vunnu hjørtuni hjá nógvum danskarum, og ikki minst hjá føroyingum.

Laura var fyrimyndin hjá Celeste, og tá hon helt fyri at Laura sang vakurt, spurdi Linda, um hon ikki sang betur enn Laura.

Hesum var dóttirin samd í, og spurdi, hví Linda ikki bara søkti at sleppa við til X-Factor.



Tað vóru orðini hjá dóttrini sum skuldi til, fyri at fáa Lindu at stíga fram sum sonkvinna, tá upptøkuroyndirnar vóru í Keypmannahavn. Stutt áðrenn kappingina, vóru Linda og maður hennara farin frá hvørjum øðrum, og Linda vildi við hesum vísa dóttur sínari, at hon megnaði at standa á egnum beinum.